

# Norra: Raka við olju og gass í øðrumhvørjum leitibrunni

**Jan Müller**

03.11.2013 - 16:52

Oljan.fo

Av teimum 50 brunnunum, sum eru boraðir á norska landgrunninum tvs. Norðsjónum, Norska havinum og Barentshavinum higartil í ár, raktu umleið helvtin við olju og gass skrivar petro.no. Flestu av turru brunnum vóru í Norðsjónum.

Besta úrslitið av boringum í ár finna vit í Barentshavinum. Har vóru 66,7% av boringunum fund. Úrslitið í Barentshavinum vísir eisini, at tað ikki bara er talan um gass sum higartil hildið.

Tað eru serstakliga trý feløg, sum hava borað brunnar í ár. Hesi eru Statoil (18), Lundin (11) og Wintershall (6). Týska Wintershall hevur gjørt flest fund, tilsamans 4 av 6

brunnum.

Statoil, sum hevur borað flest brunnar, íalt 18, hevur funnið olju og gass í 9 brunnum. Enn er úrslitið av Snilehorn brunninum ikki alment. Faroe Petroleum er partur av hesum brunninum.